**JÓGVAN P. LASSEN**
**PETUR EVEN DJURHUUS**
**JÓGVAN E. ELLEFSEN**
**ANNA DAM**
**INGI HØJGAARD**
**GUNN ELLEFSEN**
**JULIANNA KLETT**

J.nr. 1991602

# Viðtøkur

Navn, heimstaður og endamál

## 1. grein

**Navn** felagsins er partafelagið LÍV Holding P/F við hjánavni LÍV.

**Heimstaður** felagsins er Tórshavnar kommuna, Kopargøta 1, 100 Tórshavn.

**Endamál** felagsins er sum holdingfelag at eiga partabrøv í øðrum feløgum, umsita peningaognir og umsita rakstur av øðrum feløgum v.m., eiga og reka fasta ogn o.t. og allan handil í hesum sambandi.

Partapeningurin

## 2. grein

Partapeningur felagsins er kr. 500.000,-.

Partarnir eru kr. 1,- til støddar ella multipli av hesum og fordeild soleiðis:

A partapeningur:

| | | | |
|---|---|---|---|
| P/F Fakfelag áljóðandi | kr. | 166.667,00 ella | 33,33% |

B partapeningur:

| | | | |
|---|---|---|---|
| Uttanríkis- og Vinnumálaráðið áljóðandi | kr. | 83.333,00 ella | 16,67% og |
| Ognarfelagið LÍV áljóðandi | kr. | 250.000,00 ella | 50% |

Eingin partapeningur hevur framíhjárætt uttan tað at A partapeningur gevur rætt til vinningsbýti - sí 23. grein.

Partabrøv kunnu útskrivast og skulu um so er ljóða uppá navn.

Partaeigararnir hava onga skyldu til at lata partapening sín innloysa.

Hvør avhending av partapeningi skal skilast til í bókum partafelagsins.

Avhendan av partapeningi

**3. grein**

Við skifti av partapeningi er at skilja eitthvørt skifti av ognarrætti og/ella atkvøðurætti, (tó burtursæð frá atkvøðufulltrú til ein ávísan aðalfund) av einum parti, harundir avhending til ognar ella trygd, gáva, øll sløg av rættarsókn ella um búviðgerð/skiftiviðgerð byrjar, harundir konkursviðgerð.

Partapeningur kann bert avhendast við loyvi frá nevndini.

Um skifti av partapeningi fer fram, hava P/F Fakfelag og Ognarfelagið LÍV sínamillum forkeypsrætt. Er einki próvfast boð frá 3. persóni, og semja ikki fæst partanna millum, verður kursvirðið ásett av grannskoðara felagsins. Kursásetingin fer fram pr. tann dag, forkeypsrætturin kann gerast galdandi eftir hesum reglum, tó framvegis treytað av loyvi frá nevndini:

Kursvirðið av partapeninginum verður ásett við grundarlagi í fíggjarligu støðu felagsins og roknskapum felagsins síðstu árini, umframt eini meting av framtíðarvánunum, við tí endamáli at áseta handilsvirðið.

Um annar parturin ikki kann góðtaka tann kurs, sum grannskoðari felagsins ásetur, kann viðkomandi leggja kursásetingina fyri metingarmann, sum skal vera ríkisgóðkendur grannskoðari. Hann verður útnevndur av Sorinskrivaranum. Hendan meting er endalig og bindandi fyri báðar partar. Víkur hendan metingin meira enn 5% frá ásetingini hjá grannskoðara felagsins, skal felagið rinda kostnaðin av hesi meting. Annars rindar tann, sum hevur biðið um kursáseting frá metingarmanni.

Tann, sum ynskir at avhenda partabrøv síni, skal við skrásettum brævi boða hinum partaeigaranum, umframt nevnd felagsins, frá hesum.

Grannskoðari felagsins skal hereftir innan 30 dagar áseta kursin av partabrøvunum og skrivliga boða øllum partaeigarum og nevnd felagsins frá um ásetingina.

Um annar parturin ynskir kursásetingina roynda av omanfyri nevnda metingarmanni, skal hann innan 14 dagar eftir, at hann hevur fingið boð um kursásetingina frá grannskoðara felagsins, heita á Sorinskrivaran um at útnevna ein metingarmann, og samstundis geva hinum boð um hetta.

Forkeypsrætturin skal gerast galdandi innan tveir mánaðir eftir, at boð um endaliga kursin eru komin til partarnar. Forkeypsrætturin skal gerast galdandi fyri allan partin, sum ynskist seldur.

Keypsprísurin fyri partapeningin skal rindast kontant seinast 1 mánað eftir, at forkeypsrætturin er gjørdur galdandi.

Um forkeypsrætturin ikki er gjørdur galdandi innan omanfyri nevndu freist, kann tann av partaeigaranum, sum ynskir at selja, frítt selja partabrøv síni, um hetta verður gjørt innan 30 dagar eftir, at freistin hjá hinum partaeigaranum at gera forkeypsrættin galdandi var úti og treytað av, at avhendingin ikki fer fram til lægri kurs ella við lagaligari gjaldstreytum enn hjá hin parturin, sum hevur rætt at keypa fyri.

Um avhendingin skal fara fram eftir hesa freist, skulu omanfyri nevndu treytir um forkeypsrætt aftur verða galdandi.

Seljarin bindur seg til, um selt verður til onnur enn hin partaeigaran, at gera søluna treytaða av, at keyparin yvirtekur rættindi og skyldur hjá seljara eftir hesum sáttmála.

Partaeigari kann bert veðseta partabrøv síni við skrivligum loyvi frá hinum partaeigaranum og treytað av, at veðhavarin skrivliga váttar at virða hendan partaeigarasáttmála.

P/F Fakfelag hevur í einum tíðarskeiði upp til 10 ár frá 1. september 2016 at rokna, rætt til at yvirtaka tann partapening, sum Uttanríkis- og Vinnumálaráðið eigur í felagnum, svarandi til 16,67% av partapeninginum fyri kr. 11.666.666,67.

Tá 10 ár eru farin, hevur P/F Fakfelag skyldu til at yvirtaka restpartapeningin hjá Vinnumálaráðnum fyri sama keypspening sum ásett er í stykkinum frammanfyri.

Ger P/F Fakfelag síni keypirætt galdandi, skal P/F Fakfelag yvirtaka allan restpartapeningin undir einum.

Uttanríkis- og Vinnumálaráðið tilskilar sær somuleiðis rætt til at krevja, at einhvør søla av partapeningi í felagnum, eisini fevnir um teirra partapening, soleiðis at ráðið hevur ein viðsølurætt til triðjamann.

Ein og hvør avhending av partabrøvum er treytað av, at ein møguligur nýggjur partaeigari tekur við innihaldinum av hesum viðtøkum.

Uppsøgn - innloysan av partabrøvum

**4. grein**

Um partaeigararnir gerast varandi ósamdir og ikki kunnu tosa seg til rættis um teir spurningar, sum ósemja er um, og eingin semja fæst, eru partarnir samdir um, at samstarvið millum partaeigararnar so má kunna halda uppat.

Um samstarvið partanna millum má halda uppat, hava partarnir sínamillum rætt til at innloysa hvønn annan eftir hesum reglum:

Tann partaeigari, sum orsakað av eini ósemju ynskir at sleppa burtur úr ognarskapinum, kann í innskrivaðum brævi bjóða hinum partaeigarunum at keypa síni partabrøv í felagnum fyri eitt ásett kursvirði, sum skal tilskilast í sølutilboðnum.

Hinir partaeigararnir hava eina freist uppá 8 vikur eftir, at teir hava móttikið tilboðið, at gera keypsrættin galdandi, svarandi til teirra ognarpart. Verður keypsrætturin gjørdur galdandi, hava viðkomandi partaeigarar skyldu til at rinda keypspeningin fyri partabrøvini kontant í seinasta lagi 4 vikur eftir, at teir hava tikið av keypstilboðnum.

Teir partar, sum hava móttikið skrivligt tilboð um at keypa partabrøvini og hava keypsrættin, hava skyldu til, antin at taka av keypstilboðnum ella, um teir ikki taka av tilboðnum, at krevja, at tann

partaeigari, sum hevur sett fram sølutilboðið, skal keypa teirra partabrøv fyri sama kurs, sum teimum hava staðið í boði at keypa partabrøvini fyri.

Sostatt hevur tann parturin, sum setur fram tilboð um sølu av partabrøvunum, samstundis eina skyldu til at keypa øll partabrøvini frá hinum partaeigarunum fyri sama kurs, sum hann hevur bjóðað. Keypspeningurin fyri partabrøvini skal rindast kontant í seinasta lagi 4 vikur eftir, at viðkomandi partaeigarar hava fingið boð frá mótpartinum um, at hann ikki tekur av tilboðnum.

Um partarnir gerast varandi ósamdir, kann hesin innloysingarrættur ikki nýtast fyrr enn eftir 1. september 2019, aftaná, at partapeningurin í felagnum endaliga er avhendaður til partarnar, svarandi til 50% til Ognarfelagið LÍV og 33,33% P/F Fakfelag. Ásetingarnar omanfyri eru ikki galdandi fyri ognarlutin hjá Uttanríkis- og Vinnumálaráðnum, men verður harafturímóti víst til ásetingarnar í 3. grein in fine.

Fráboðan

**5. grein**

Boð frá partafelagnum til partaeigararnar skulu sendast hvørjum einstøkum skrivliga til tann bústað, ið seinast er skrivaður í partabrævabókina ella við lýsing í almennum føroyskum lýsingarblaði.

Forsónast partabræv, kann nevndin, um hon verður biðin um tað, fáa tað gjørt deytt og virðisleyst eftir teim reglum, sum ásettar eru í VFL § 64, stk. 2, um ógildan av partabrøvum.

Aðalfundurin

**6. grein**

Aðalfundurin verður skipaður av partaeigarum, ið hava eina atkvøðu fyri hvønn part uppá kr. 100,-. Partarnir skulu verða innskrivaðir í partabrævabók felagsins seinast ein mánað, áðrenn aðalfundurin verður hildin, fyri at geva atkvøðurætt.

**7. grein**

Nevndin boðar til aðalfund á heimstaði felagsins við tilskilan av tíð, stað og dagsskrá í minsta lagi 14 dagar og í mesta lagi 4 vikur frammanundan aðalfundin, hetta við skrivliga at venda sær til hvønn einstakan partaeigara á tí bústaði, ið seinast er skrivaður í partabrævabókina ella við lýsing í almennum føroyskum kunngerðarblaði.

**8. grein**

Vanligur ársaðalfundur verður hildin á hvørjum ári fyri 1. mai til at viðgera.

1. Frásøgn nevndarinnar um virki felagsins í farna roknskaparári.
2. Framløga av grannskoðaðum ársroknskapi til góðkenningar.
3. Avgerð um hvussu møguligt avlop ella tap, sambært roknskapinum, verður nýtt – sí grein 23.
4. Val av nevndarlimum, sí 16. grein.
5. Val av grannskoðarum, ið sita til næsti vanligi ársaðalfundur er lokin – sí 22. grein.
6. Møguligt uppskot, ið nevndin ella partaeigararnir ynskja at viðgera.

**9. grein**

Allir partaeigarar hava heimild til skrivliga at frambera uppskot til viðgerðar á aðalfundinum; hesi uppskot skulu setast á dagsskrá til tann fyrsta aðalfundin, sum hildin verður í mesta lagi 4 vikur aftaná at uppskotið er latið inn.

Eykaaðalfundur

**10. grein**

Eykaaðalfundur verður lýstur, tá ið stjórnin, nevndin, ein aðalfundur ella grannskoðari vil, ella tá ið partaeigarar, ið tilsamans eiga 5% av partapeninginum, skrivliga krevja tað til at viðgera evni, ið samstundis verða tilskilað.

Framløga

**11. grein**

Í seinasta lagi 2 vikur frammanundan hvørjum aðalfundi verður at leggja fram á skrivstovu felagsins til eftirlit fyri partaeigararnar, dagsskrá og fullfíggjað uppskot, ið verða at bera fram á aðalfundinum, og til vanligan aðalfund eisini ársroknskapur.

Fundarrættur og orðstýrari

**12. grein**

Atgongd til aðalfundin hava partaeigarar, ið eftir eigarayvirlitinum kunnu prógva, at teir eru partaeigarar. Partaeigari kann skrivliga geva øðrum partaeigara fulltrú til at fara á fund og greiða atkvøðu hansara vegna.

**13. grein**

Aðalfundurin verður stýrdur av einum av nevndini valdum orðstýrara.

Atkvøðugreiðsla

**14. grein**

Á aðalfundinum verða øll mál at gera av við vanligum atkvøðumeiriluta.

Partaeigararnir eru samdir um, at avgerðir av stórum týdningi fyri felagið ella onkran av partaeigarunum ikki kunnu takast, hvørki á aðalfundi ella á nevndarfundi uttan so, at partaeigararnir eru samdir. Avgerðir av stórum týdningi eru:

- *Broyting av viðtøkum felagsins*
- *Broyting í starvsskipan fyri nevndina*
- *Uppskot til aðalfundin um vinningsbýti*
- *Góðkenning á nevndarfundi av roknskapi felagsins til at leggja fyri grannskoðanina og fyri aðalfundin*
- *Upptøka av lánum*
- *Ásetan av krøvum til fíggjarliga rapportering/stýring til nevndina og til partaeigararnar*
- *Avgerðir um munandi víðkan av virksemi felagsins, harundir hækking og/ella lækking av partapeningi felagsins*
- *Sølu av virki og/ella virksemi felagsins*

Til at samtykkja viðtøkur, ið miða ímóti broytingum av felagslógini ella avtøka av felagnum, krevst tó semja frá øllum partapeninginum.

**15. grein**

Tað, sum verður havt til umrøðu á aðalfundinum, verður ført í eina fundarbók, sum verður undirskrivað av orðstýraranum.

**16. grein**

Øll atkvøðugreiðsla fer fram skrivliga, uttan so at fundurin velur annan atkvøðugreiðsluhátt.

Nevndin

**17. grein**

Felagið verður stýrt av eini á aðalfundi valdari nevnd, sum hevur 5 nevndarlimir.

Partaeigararnir eru samdir um at miðast skal eftir, at nevndin verður vald við semju partanna millum við tí fyri eyga at fáa eina so kompetenta og vælvirkandi nevnd sum gjørligt, og skulu partaeigararnir frammanundan aðalfundinum ummæla nevndarvalið við atliti til at fáa semju um nevndarlimirnar og formannin. Um semja ikki fæst, verður nevnd felagsins vald eftir uppskoti frá partaeigarunum soleiðis:

- P/F Fakfelag: 2 nevndarlimir
- Ognarfelagið LÍV: 2 nevndarlimir
- Formanni, ið partarnir eru samdir um.

Partaeigararnir binda seg til at atkvøða fyri teimum limum, sum hvør av partaeigarunum á aðalfundi skjýtur upp, og at áleggja teimum nevndarlimum, ið eru valdir, eisini at atkvøða samsvarandi hesum viðtøkum.

Hvør partaeigari bindur seg til at boða hinum partaeigarunum frá teirra uppskoti til nevndarumboðan í seinasta lagi 7 dagar áðrenn aðalfundin.

**18. grein**

Nevndin hevur fund so ofta formaðurin heldur tað vera neyðugt ella um ein av hinum nevndarlimunum ynskir tað.

Eingin avgerð kann verða tikin á nevndarfundi, uttan so at í minsta lagi 2/3 av nevndarlimunum eru á fundi.

Fundarumrøður og viðtøkur verða skrivaðar í bók, sum verður undirskrivað av øllum á fundi.

Nevndin hevur heimild at geva fulltrúarumboð.

Stjórnin

**19. grein**

Nevndin setur ein stjóra.

Tekningarreglur

**20. grein**

Felagið verður bundið við undirskrift av allari nevndini ella formanninum saman við einum stjóra.

Roknskapur, grannskoðan og umsitingin av peningi og býtið av ársyvirskotinum

**21. grein**

Roknskaparár felagsins er álmanakkaárið.

**22. grein**

Á hvørjum ári verður valdur ein grannskoðari, sum skal vera løggildur.

**23. grein**

Við ársuppgerð skulu eisini verða gjørdar - eftir nevndarinnar ætli - neyðturvuligar avskrivingar og niðurskrivingar, sambært lóg.

Aðramáta eru partarnir samdir um at virka fyri, at felagið er ført fyri og kann lata eitt rímiligt vinningsbýti til A-partapeningin við atliti til felagsins rakstur, eins og felagið avheldur neyðugar beinleiðis útreiðslur til dekning av rakstri hjá Ognarfelagnum Lív.

Partaeigararnir binda seg til at atkvøða fyri útlutan av vinningsbýti sum omanfyri ásett, í tann mun hetta ikki er í stríð við galdandi reglur um vinningsbýti. Útyvir hetta, eru partarnir samdir um, at tað ikki skal bera pørtunum til at taka út vinningsbýti, uttan til útreiðslur, sum íleggjarar hava havt til keyp av partapeninginum.

Tað verður heimilað felagsins leiðslu at luta út eyka vinningsbýti í tann mun, tað er ráðiligt samanborið við fíggjarligu støðu felagsins.

Soleiðis samtykt á aðalfundi hin 20. apríl 2017

**Nevndin**